# Føroya Ráfiskakeyparafelag

# Ársfrágreiðing fyri 2006

Ein lýsing av fiskivinnuni og virkseminum hjá felagnum

## Samandráttur og frágreiðing frá nevndini

Í 2006 eru fíggjarligu úrslitini hjá flakavinnuni heldur frægari enn undanfarna ár. Fyribilsúrslit, sum Ráfiskakeyparafelagið hevur fingið vitan um frá limunum vísa, at í 2006 varð samlaða úrslitið hjá vinnuni umleið15 mió. kr. Hetta er væl frægari enn í 2004 og 2005, tá hallið var ávíkavist góðar 40 mió kr. og 15 mió kr, men tó ikki nøktandi.

Orsøkirnar til betraðu úrslitini eru fyrst og fremst at finna á marknaðinum, sum hevur víst seg at roynast munandi betri í 2006 enn undanfarnu tvey árini. Dollarin var høgur í 2006 og hevur hetta ávirkan á úrslitini hjá vinnuni. Hinvegin so er dollarin, nú komið er út í 2007, á søguliga lágum støði.

Kappingin um føroysku ráværuna er framvegis sera hørð. Sokallaði Hoyvíkssáttmálin kom í gildi í 2005 og eisini varð kumuleringsavtalan við ES fingin í lag. Tað verður tó ikki mett, at møguleikin at keypa ráværu úr Íslandi og Noregi hevur bøtt nakað serligt uppá ráværutilgongdina til føroysku virkini.

Útflutningsvirðið, sum minkaði frá 2002 til 2004, stabiliseraði seg í 2005 er hækkað nakað í 2006 og liggur nú á umleið 3,4 mia. kr. Samlaða nøgdin av fiskavørum, sum er útflutt, er minka nakað síðan 2002, og eru tað m.a. minkandi nøgdir av laksi, sum gera mun. Roknað verður við, at útflutningurin av laksi í ár hækkar og vil hetta nokk hava jaliga ávirkan á samlaða útflutningin í 2007.

Feskfiskaveiðan undir Føroyum í 2006 er umleið á sama støði sum í 2005 ella umleið 134.000 tons.

Seinastu regluligu yvirlitstrolingarnar hjá Magnusi Heinasyni fiskirannsóknarskipi, sum verða gjørdar fyri at fáa til vega tilfar til stovnsmetingarnar, vísa at útlitini fyri toska-, hýsu- og upsastovnarnar eru heldur vánalig. Sambært fiskifrøðingunum hevur serliga toskurin alla vernd fyri neyðini. Reyðsprøka, havtaska, longa og brosma tykjast at vera hampiliga væl fyri, og stóri og smái kongafiskurin er á einum støðugum, men lágum støði.

Av málum, sum Ráfiskakeyparafelagið hevur brúkt sína orku uppá í 2006, eru m.a.

Flakavinnan manglar arbeiðsmegi. Hetta er eitt mál, sum m.a. Ráfiskakeyparafelagið hevur reist. Vinnuhúsið gjørdi í 2006 eina kanning millum fyritøkur í byggivinnuni, fiskavirkisvinnuni umframt øðrum vinnum. Kanningin vísti, at tað serliga eru fiskavirkini, sum mangla arbeiðsfólk. Arbeiðsloysið í Føroyum er metlágt í løtuni, og hevur hetta serliga ávirkan á fiskavirkini. Ráfiskakeyparafelagið metir, at tað er alneyðugt, at virkini fáa møguleikan at fáa starvsfólk aðrastaðni frá. Í samband við, at Granskingardepilin hevur gjørt eina kanning millum starvsfólk í flakavinnuni skipaði Ráfiskakeyparafelagið fyri einum temafundi um

avbjóðingarnar hjá vinnuni at fáa starvsfólk. Tá fingu vit staðfest, at ein kunngerð er á veg, sum skal lætta um viðgerðina av umsókum um at fáa arbeiðsfólk til landið. Henda kunngerðin verður gjørd av donskum myndugleikum tí útlendingaøkið er danskt. Henda kunngerð kemur væntandi í juni mánaða.

Ráfiskakeyparafelagið hevur eisini tikið málið um, at tá verkføll eru á almenna arbeiðsmarknaðinum so leggst útjaðarin lamin. Samskift hevur verið við avvarandi landsstýrismenn um at finna eina loysn á hesum, men tað er lítið komið burturúr, sjálvt um vit meta, at landsstýrismennirnir hava skilt støðuna og eisini havt vilja til at gera nakað við máli. Tó er einki hent enn.

Umhvørvismerking er á dagsskrá og alt fleiri fiskiskapir søkja um umhvørvismerki. Føroyska vinnan eigur at taka støðu til hetta mál og hevur Ráfiskakeyparafelagið havt fundir við Seljarafelagið um málið. Einki konkret er komið burturúr hesum enn.

Fiskimálaráðið hevur endurskoðað lógina um vinnuligan fiskiskap. Orsaka av manglandi undirtøku í samgongurni er bert partar av lógarbroytingunum lagdar fram. Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur eins og hini vinnufeløgini umboð í fylgibólki til arbeiðsbólkin, sum hevur gjørt arbeiðið við at endurskoða lógina.

Í fyrsta ársfjóðringnum í 2007 hevur gingið hampuligt hjá virkjunum. Apríl mánaði hevur verið slakur og kappingin um fiskin harðnar. Dollarin fellur alsamt og hevur tað stóra ávirkan á marknaðin. Spurningurin er eisini, hvussu fiskiskapurin undir Føroyum fer at roynast, nú yvirlitstrolingarnar vísa, at tilgongdin til týdningarmestu stovnarnar framvegis sær út til at minka.

# Innihald

**INNGANGUR** .......... **5**

RÁFISKAKEYPARAFELAGIÐ .......... 5

**UM FISKI- OG FLAKAVINNUNA** .......... **6**

ÚTFLUTNINGURIN .......... 6
FLAKAVINNAN .......... 6
RÁVØRUTILGONGDIN TIL VINNUNA .......... 7
VEIÐULIÐIÐ .......... 10
ÚTLITINI FYRI FISKISKAPIN UNDIR FØROYUM .......... 11

**VIRKSEMI FELAGSINS Í FARNA ÁRI** .......... **12**

VIRKINI MANGLA ARBEIÐSMEGI .......... 12
ELEKTRÓNISK SPORFØRISSKIPAN .......... 13
HOYVÍKSSÁTTMÁLIN .......... 13
MØGULEIKAR AT KEYPA RÁVØRU UTTANLANDS .......... 13
UMHVØRVISMERKING .......... 14
*Norska Reiðarafelagið søkt um umhvørvismerki til upsa* .......... *14*
*Íslendingar gera "Withe Paper"* .......... *15*
*Avleiðingar* .......... *15*
*Hvat gera vit?* .......... *15*
ENDURSKOÐAN AV LÓGINI UM VINNULIGA FISKISKAP .......... 15
FISKUR BJÓÐAÐUR ÚT Í STØDDUM .......... 16
RIST Í SVARTKJAFTATROL .......... 16
VERKFØLL RAKA ÚTJAÐARAN .......... 16

# Inngangur

Henda ársfrágreiðing varð løgd fram á aðalfundinum hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag tann 2. mai 2007. Ráfiskakeyparafelagið er eitt áhugafelag hjá ráfiskakeyparum í Føroyum. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið vara av fiskivinnuni. Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og øðrum vinnufeløgum.

Endamálið við frágreiðingini er at geva limum okkara og øðrum áhugaðum eina stutta lýsing av gongdini í fiski- og flakavinnuni og virksemi felagsins.

## Ráfiskakeyparafelagið

Í nevndini fyri Føroya Ráfiskakeyparafelag eru:

Andreas F. Hansen, formaður

Símin Jacobsen, næstformaður — Petur Mohr

Jógvan Gregersen — Páll Gregersen

Limirnir í Føroya Ráfiskakeyparafelag eru:

| | |
|---|---|
| FarIta P/F | Sandoy Seafood P/F |
| Kaldbak Seafood P/F | Thomsen P/F |
| Delta Seafood | Eystís P/F |
| J.M.A. v/Jógvan Absalonsen | Nofa P/F |
| Faroe Seafood P/F | Norðís P/F |
| Tavan Sp/f | Suðuroyar Fiskakeyp |
| Vaðhorn Seafood P/F | Rainbow Seafood Sp/f |
| Fiskavirkið P/F | Faroe Marine Biotech P/F |
| Kósin P/F | Norfra Sp/f |
| Hvilvtenni P/F | Eldborg Fisk Sp/f |
| Nevið Fiskaeksport Sp/f | |

# Um fiski- og flakavinnuna

## Útflutningurin

Samlaði føroyski útflutningurin av fiskavørum í nøgd og virði er vístur í myndini niðanfyri. Myndin vísir, at samlaða nøgdin er minkað síðan 2003, og er hetta serliga orsaka av gongdini í alivinnuni. 2006 varð árið har útflutningurin av laksi og sílum varð ein tann lægsti í nógv ár. Útflutningsvirðið miknaði somuleiðis frá 2002 til 2005, men í 2006 er tað hækkað nakað aftur og liggur nú á umleið 3,5 mia. kr.

Mynd 1. Útflutningur av fiskavørum nøgd og virði frá 2000 til 2006 (Kelda: Hagstova Føroya)




## Flakavinnan

Í 2006 eru fíggjarligu úrslitini heldur frægari enn undanfarna ár. Fyribilsúrslit, sum Ráfiskakeyparafelagið hevur fingið vitan um frá limunum vísa, at í 2006 vórðu samlaðu úrslitini einar 15. mio kr. hjá eini samlaðari flakavinnu. Hetta er væl frægari enn í 2005, tá samlaða hallið varð meira enn 15 mió. kr., men tó ikki nøktandi. Orsøkirnar til betringina í úrslitunum eru fyrst og fremst at finna á marknaðinum, sum hevur víst seg at roynast munandi betri í 2006 enn undanfarnu árini.

Mynd 2. Útflutningur býtt á vørubólkar av toski, hýsu og upsa (Kelda: Hagstova Føroya)

| | **Nøgd í tonsum** | | **Virði í 1.000 kr.** | | **Miðalprísur/kg.** | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2005** | **2006** | **2005** | **2006** | **2005** | **2006** |
| Flak, fryst og kølt | 25.794 | 26.452 | 597.973 | 718.724 | 23,18 | 27,17 |
| Saltfiskur, flaktur og flak | 14.113 | 12.720 | 421.642 | 354.967 | 29,88 | 27,91 |
| Heilur fiskur, frystur og køldur | 27.337 | 17.646 | 306.346 | 269.302 | 11,21 | 15,26 |

Samlaði útflutningurin av flaki – frystum og køldum burturúr toski, hýsu og upsa øktist við umleið 1.500 tonsum frá 2005 til 2006, meðan virðið øktist við góðum 100 mió. kr. Nøgdirnar av útfluttum saltfiski eru minkaðar við 2.500 tonsum og miðalprísurin á saltfiski er minkaður nakað í mun til undanfarna ár. Nøgdin av frystum og feskum óvirkaðum fiski er minkað nakað í 2006 í mun til 2005, tó ikki tilsvarandi nógv í virði. Sum mynd 2 vísir, er miðalprísurin á heilum frystum og feskum fiski hækkað við umleið 2 kr. pr. kg. í tíðarskeiðnum.

Flakavinnan hevði nøkur góð ár í 2001 og 2002. Í 2003, 2004 og 2005 var raksturin tungur og fleiri virkir høvd hall. Í 2006 gekk heldur betur og eru tað summi virkir sum skarða framúr, meðan onnur virkir framvegis hava hall. Saltfiskavirkini hava ikki gingið so væl í 2005 og 2006 sum undanfarin ár, og er tað fyrst og fremst orsaka av, at sera lítið av toski hevur verið at fingið til framleiðslu og kappingin um tann toskin, sum er, hevur verið sera hørð. Marknaðarprísurin á saltfiski hevur hildið sær væl, men verður framvegis settur undir trýst serliga frá íslendskum framleiðarum, sum eru komnir inn á sama marknað, sum føroyingar hava verið á í Spaniu seinnu árini.

## Rávørutilgongdin til vinnuna

Um hugt verður eftir fiskiskapinum undir Føroyum seinastu árini, kann staðfestast, at feskfiskaveiðan lækkaði eitt vet í 2006 í mun til 2005. Nøgdin var á góð 134.000 tons. Virðið á feskfiskaveiðuni er tó økt nakað í 2006 í mun til 2005. Í talvu 3 sæst, at sjálvt um nøgdirnar á hýsu og upsa eru nakað minni í 2006 enn í 2005, er virðið á hesum fiskasløgum økt. Myndin vísir eisini, at veiðan eftir øðrum fiskasløgum er økt nakað væl í 2006 í mun til 2005. Hetta er fyrst og fremst veiðan eftir gulllaksi, sum økti frá knøppum 7.000 tonsum í 2005 til góð 12.000 tons í 2006.

Mynd 3. Feskfiskaveiða í nøgd, virði og miðalprísur 2005 og 2006 (Kelda: Hagstova Føroya)

| | Nøgd í tons | | Virði í 1.000 kr. | | Miðalprísur pr. Kg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **2005** | **2006** | **2005** | **2006** | **2005** | **2006** |
| **Toskur** | 18.879 | 13.599 | 340.222 | 263.096 | 18,02 | 19,35 |
| **Hýsa** | 19.977 | 16.574 | 198.704 | 201.311 | 9,95 | 12,15 |
| **Upsi** | 62.077 | 60.140 | 248.494 | 314.116 | 4,00 | 5,22 |
| **Annar botnfiskur** | 12.701 | 15.954 | 114.624 | 178.970 | 9,02 | 11,22 |
| **Flatfiskur tils.** | 7.214 | 7.032 | 191.771 | 200.698 | 26,58 | 28,54 |
| **Onnur fiskasløg tils.** | 13.900 | 20.886 | 52.570 | 89.456 | 3,78 | 4,28 |
| **Veiðan tilsamans** | 134.747 | 134.185 | 1.146.385 | 1.247.645 | | |

Minking er í toskafiskiskapinum fjóðra árið á rað. Fiskiskapurin eftir toski er minkaður úr umleið 25.000 tonsum í 2004 til smá 19.000 tons í 2005 og í 2006 eru fiskað 13.600 tons av toski. Vert er at minnast til, at í 2005 fiskaðu lemmatrolarar á Íslandsrygginum, meðan tað í 2006 ikki varð fiskað nógv har. Fiskiskapurin eftir hýsu er somuleiðis minkaður triðja árið á rað og er veiðan í 2006 góð 16.000 tons. Miðalprísurin bæði á toski og hýsu hækkaði í 2005 við millum 2 og 3 kr. kg. í mun til 2004, og í 2006 er toskaprísurin aftur hækkaður eina góða krónu í mun til 2005. Hýsuprísurin er hækkaður við góðum tveimum kr. í tíðarskeiðnum. Miðalprísurin á upsa hækkaði eina knappa krónu frá 2004 til 2005, og er aftur hækkaður við 1,22 kr frá 2005 til 2006. Upsaprísurin er nú komin uppaftur á prísstøðið, sum var í 2000-2002.

Mynd 4. Miðalprísir á toski, hýsu og upsa frá 2000-2005 (Kelda: Hagstova Føroya)




Mynd 4. vísir, at miðal upsaprísurin í 2006 er omanfyri prísin í 2000-2002, tá prísirnir vóru mettir at vera sera góður. Toska- og hýsuprísirnir vísa seg eisini at hava hækkað munandi síðan 2004.

Útflutningurin av heilum køldum fiski hevur, síðan ógvusligu hækkingina í tíðarskeiðnum frá 2000 til 2003 lækkað munandin fram til 2006. Samlaða nøgdin av óvirkaðum fiski var í 2006 góð 29.000 tons í mun til góð 38.000 tons árið fyri. Tá nøgdin av fiski, sum er avreidd av føroyskum fiskiførum er nakað tann sama í 2006 sum í 2005 merkir tað, at størri parturin av fiskinum verður virkaður í Føroyum nú enn undanfarin ár.

Mynd 5. Útflutningur av heilum køldum fiski (Kelda:Hagstova Føroya)




| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 3.470 | 4.486 | 10.188 | 8.396 | 6.182 | 4.371 | 3.673 |
| Hýsa | 4.244 | 6.445 | 13.183 | 14.426 | 12.107 | 10.578 | 9.503 |
| Upsi | 1.814 | 5.210 | 11.265 | 13.208 | 9.374 | 11.874 | 4.162 |
| Annað | 5.209 | 7.707 | 8.968 | 11.794 | 13.387 | 11.773 | 11.982 |
| Íalt | 14.737 | 23.848 | 43.604 | 47.824 | 41.050 | 38.596 | 29.320 |

Um hugt verður eftir, hvussu nógvur fiskur er landaður uttanlands frá 2000-2006 sæst á mynd 6, at í 2003 vórðu nærum 24.000 tons av fiski landaði uttanlands og at hetta er fallið niður á góð 7.000 í 2006. Serliga eru tað landingarnar av toski og hýsu, sum eru minkaðar niður í umleið 500 tons hvør í 2006 og upsin niður á góð 2.000 tons.

Mynd 6. Landingar uttanlands 2000-2006 (Kelda: Fiskiveiðueftirlitið)




Eftirspurningurin eftir fiskavørum er góður, og fiskakeyparar rokna við, at góðu prísirnir fara at halda árið út. Spurningurin er, hvussu fiskiskapurin undir Føroyum fer at roynast, nú yvirlitstrolingarnar vísa, at tilgongdin til týdningarmestu stovnarnar framvegis sær út til at minka.

## Veiðuliðið

Fiskiskapurin hjá partrolarum í 2006 hevur verið heilt góður ella áleið á sama støði sum í 2005. Fiskiskapurin hjá lemmatrolarunum hevur verið sløk 3.000 tons hægrið enn í 2005. Línufiskiskapurin fellur framvegin og er samlaða veiðan komin niður á góð 32.000 tons í mun til sløk 47.000 tons í 2003

Mynd 7. Fiskiskapurin hjá heimaflotanum frá 2002-2006 í tonsum (Kelda: Hagstova Føroya)

| | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 |
|---|---|---|---|---|
| **Lemmatrol** | 30.627 | 30.609 | 30.878 | 33.264 |
| **Partrol** | 48.607 | 44.962 | 62.811 | 61.912 |
| **Lína** | 46.880 | 40.230 | 34.972 | 32.595 |
| **Snella** | 4.146 | 2.963 | 2.824 | 3.232 |
| **Gørn og annað** | 3.445 | 3.305 | 3.264 | 3.182 |
| **Reiðskapur tilsamans** | 133.704 | 122.069 | 134.748 | 134.185 |

Úrslitini hjá flotanum í 2006 eru heldur frægari enn í 2005. Góði fiskaprísurin sæst aftur í úrslitunum hjá skipunum. Ein ávís endurnýggjan er farin fram seinastu árini og útlit eru fyri, at onkur nýggj skip koma í flotan í hesum árinum.

Verður hugt eftir veiðumynstrinum í fiskiskapinum undir Føroyum fyrstu tveir mánaðirnar í ár, í mun til fyrstu tveir mánaðirnar í 2006 sæst, at fiskiskapurin í ár er heldur lakari. Fyrstu tveir mánaðirnar í 2005 vórðu knøpp 29.000 tons av fiski veidd í mun til góð 22.000 tons sama tíðarskeið í ár. Fiskiskapurin eftir upsa, er lækkaður uml. 3.000 tons, meðan fiskiskapurin eftir toski er góð 500 tons minni í 2007. 100 tons minni eru komin uppá land av hýsu fyrstu tveir mánaðirnar í ár í mun til sama tíðarskeið seinasta ár.

## Útlitini fyri fiskiskapin undir Føroyum

Seinastu regluligu yvirlitstrolingarnar hjá Magnusi Heinasyni fiskirannsóknarskipi, sum verða gjørdar fyri at fáa til vega tilfar til stovnsmetingarnar vísa, at útlitini fyri tosk eru vánalig. Hýsan og upsin eru heldur frægari fyri enn toskurin. Endaliga niðurstøðan um stovnarnar og tilráðingar til komandi fiskiár eru ikki gjørdar enn og minnast skal til at yvirlitstrolingarnar er bert ein partur av stovnsmetingini.

Fiskifrøðingarnir vísa á, at fiskastovnarnir eru hart royndir, og at tað er tilgongdin av ungfiski, sum í stóran mun ger av, hvussu stórir fiskastovnarnir eru einstøku árini. Tilgongdin til hesar tríggjar stovnarnar í ár er ikki góð og roknað verður við at stovnarnir tí eru í minking. Hvussu fiskurin veksur hevur sjálvandi eisini týdning fyri stovnsstøddina, og í ár vísa kanningarnar, at toskurin og hýsan eru hampiliga fyri, meðan serliga upsin vísir seg at vera illa fyri.

Sambært fiskifrøðingunum hevur serliga toskurin alla vernd fyri neyðini. Hvítingsbróður og lítli kongafiskurin tykjast at vera heilt væl fyri, meðan nógv minni er fingið av svartkjafti í mun til í fjør. Somuleiðis vóru nøgdirnar av gulllaksi, havtasku, reyðsprøku, og tungu minni í ár enn undanfarna ár.

# Virksemi felagsins í farna ári

Niðanfyri er ein stutt lýsing av teimum málum, sum Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur arbeitt við seinasta árið.

## Virkini mangla arbeiðsmegi

Flestu fiskavirkini mangla arbeiðsmegi. Seinasta árið eins og í 2005 var merkt av, at fiskavirkir mangla arbeiðsmegi. Vinnuhúsið gjørdi eina kanning í 2006, sum vísti, at 52% av virkinum mangla arbeiðsmegi. Arbeiðsloysið í Føroyum er framvegis lágt og tað sær út til, at tað alsamt gerst lægri. Nýggjastu hagtølini vísa, at arbeiðsloysi í Føroyum er farið niður á 1,7%. Hetta hevur serliga ávirkan á fiskavirkini, tí hesin parturin av arbeiðsstyrkini er sera mobilur.

Fiskavirkini venda sær vanliga til ALS fyri at fáa starvsfólk, umframt at lýsa í fjølmiðlunum. Hesin háttur at fáa fleiri starvsfólk hevur víst seg at hjálpt lítið. Kanningin sum Vinnuhúsið gjørdi vísti, at virkini vóru samd um, at tey ikki høvdu fingið neyðugu fólkini frá ALS, og at ávísingin hjá ALS ikki virkar yvirhøvur, tí næstan eingin av teimum, sum virkini bjóða starv taka av.

Granskingardepilin fyri Økismenning legði í 2006 eina frágreiðing fram, sum vísti, at trivnaðurin sum heild var góður á fiskavirkinum, men at nógv at teimum, sum arbeiða har kunnu hugsa sær annað arbeiði og at hesi ikki ynsktu fyri teirra børn, at tey fóru at abeiða á fiskavirkjum. Henda niðurstøða sigur okkum at, at flytiførið í arbeiðsstyrkini á fiskavirkjunum er stór og gevur hetta grundarlag fyri at opna upp fyri møguleikanum at fáa útlendska arbeiðsmegi til Føroya til hesi størv. Hetta er gongdin í londunum rundan um okkum, meðan Føroyar sum einasta land hevur ein sera restriktivan útlendingapolitikk.

Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur tí í samstarvi við Føroya Arbeiðsgevarafelag heitt á myndugleikarnar um at bera so í bandi, at til ber at fáa útlendska arbeiðsmegi hendavegin. Í løtuni sær út til at nýggj lóggáva er á veg, sum fer at hjálpa uppá hetta. Henda lóggáva kemur í juni 2007 sambært landsstýrismanninum í Innlendismálum.

Tað er alneyðugt, at virkini fáa møguleikan at fáa starvsfólk aðrastaðni frá í teimum tíðarskeiðum, tá nógvur fiskur er. Hetta hevði eisini havt við sær, at virkini betri høvdu kunna tilrættlagt arbeiðið í háárstíð við tveyskiftisvaktum.

## Elektrónisk sporførisskipan

Føroya Sporførisskipan er felag, sum Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur stovnað saman við Føroya Ráfiskakseljarafelag. Felagið arbeiðir við at menna eina elektroniska farleið til sporføris- og hagtalsupplýsingar frá vinnuni til almennar stovnar, og millum ymisku liðini í virðisketuni frá fiskiskapi til keyparan á altjóða marknaðinum.

Í hesum felagnum verður miðjað ímóti, at Føroyar kunnu gerast fyrsta land í heiminum, har allur fiskur er digitalt sporbærur av grunni at munni. Hildið verður, at hetta kann geva føroyskum fiskavørum ein kappingarfyrimun á marknaðinum. Skipanin fevnir um øll lið í virðisketuni - skip, landingarmiðstøðir, fiskamarknaðir, flutningsfeløg, framleiðsluvirkir, fiskasølur og útflutningsfeløg.

Til várs verður skipanin royndarkoyrd og nakrar fyritøkur hava bjóðað seg fram at verða við til at royndarkoyra skipanina. Royndarkoyringin ferð at taka umleið ein mánaða og eftir tað skuldi verði klárt til, at skipanin kann takast í brúk alment.

## Hoyvíkssáttmálin

Nógv kjak hevur verið um Hoyvíkssáttmálan og møguleikan hjá føroyskum fyritøkum at keypa rávøru í Íslandi. Hetta hevur ikki víst seg at vera so einfalt. Íslendingar hava forðingar í lóggávuni, sum gera at illa ber til at keypa íslendskan fisk. Ein forðing er tó avtikin mótvegis Føroyum. Tað er, at 10% vóru løgd omaná vektina, sum íslendsk skip landa uttanlands. Enn er tó onkur forðing eftir og tað er m.a. at bert eitt landingarstað í Føroyum kann góðkennast av íslendskum myndugleikum. Arbeitt verður nú við at fáa fleiri landingarstøð góðkend. Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur mælt til, at Landingarmiðstøðin á Tvøroyri, Kongshavn og Landingarmiðstøðin í Klaksvík skulu kunna fáa góðkenning umframt Landingarmiðstøðin á Toftum.

## Møguleikar at keypa rávøru uttanlands

Í sambandi við, at Føroyar gjørdist partur av alevropisku kumuleringaavtaluni 1. dec 2005, hevur Ráfiskakeyparafelagið hugt eftir hvørjir møguleikar eru hjá føroyskum virkjum at keypa rávøru frá serliga Íslandi og Norra.

Soleiðis sum støðan er nú, eru framvegis ávísar forðingar fyri at keypa íslendskan fisk at virka her. Arbeitt verður við hesum og vón er um, at hesar forðingar verða avtiknar. Tó kunnu íslendsk skip selja um uppboðssølu í Føroyum og landa á landingarmiðstøðini á Toftun uttan forðingar.

Norskur fiskur kann keypast til Føroya til virkingar og tað eru bert skip úr Norður-Noregi, sum hava forðingar fyri at landa aðrastaðni enn í Norður-Noregi. Hesi skip hava skyldu at landa har. Skip aðrastaðni frá í Noregi kunnu landa har tey vilja, so tað skuldi ikki verði nakar trupulleiki hjá føroyskum virkjum, at keypt norskan fisk til virkingar í Føroyum.

## Umhvørvismerking

Í januar 2005 skipaði Føroya Ráfiskakeyparafelag fyri einum temadegi um upsamarknaðin.

Upsin er í nøgd okkara týdningarmesta botnfiskaslag, og nevndin metti tað tí vera virðismikið, at vinnan, bæði á sjógvi og á landi, fekk tikið pulsin á marknaðinum. Felagið hevði tí fingið umboð fyri teir størstu upsakeypararnar at siga teirra hugsan um, hvussu upsamarknaðurin fer at síggja út í nærmastu framtíð.

Ein partur av framløgunum og tjakinum snúði seg eisini um umhvørvismerking av fiskavørum. Umboðini fyri stóru keypararnar meta, at burðardygg veiða og merking av vørunum fær vaksandi týdning og kann gerast beinleiðis krav frá keyparunum.

### Norska Reiðarafelagið søkt um umhvørvismerki til upsa

Fyri umleið einum ári síðani søkti norska reiðarafelagið um umhvørvismerki frá Marine Stewardship Counsil (MSC) fyri fiskiskapin eftir upsa. Norski upsafiskiskapurin er árliga 235.000 tons, og umsóknin um góðkenning fevnir um uml. 140.000 tons, sum er tann parturin av kvotunum, sum limirnir hjá Fiskebåtredrenes Forbund hava fingið tillutað. Sambært MSC kann restin av norska upsafiskiskapinum fáa góðkenningina seinni. Í fyrsta umfari var tað Fiskebåt, sum søkti um góðkenningina, men nú bakka øll vinnufeløgini hesa avgerðina upp. Norsku vinnufeløgini hava tað sjónarmið, at MSC er tann besti kendi felagsskapurin innan umhvørvismerking og tí hava tey valt MSC. Norðmenn hava gjørt av at í fyrsta umfari verður tað bert upsin, sum søkt verður um góðkenning til og síðani vilja tey síggja hvussu hetta ferð at roynast. Um royndirnar verða góðar er ætlanin at søkja um góðkenning til m.a. sildafiskiskapin.

### Íslendingar gera “Withe Paper”

Íslendsku vinnufeløgini hava gjørt av, í samstarvi við Fiskimálaráðið, at tað skal gerast eitt “withe paper” sum lýsir íslendsku fiskiveiðuskipanina og teir møguleikar, sum eru fyri at marknaðarføra skipanina sum burðardygga. Møguliga fara íslendingar undir at gera egna skipan fyri ecolabeling.

### Avleiðingar

Tað eru alt fleiri fiskiskapir, sum hava fingið ella eru í ferð við at søkja um umhvørvismerking. Á heimasíðuni hjá MSC sæst, at partar av m.a. Alaska Pollock, Hake og Hoki fiskiskapinum hava fingið merkið frá MSC og at tríggir upsafiskiskapir hava søkt um merkið.

Tað er ilt at meta um, hvat hetta kemur at merkja fyri møguleikarnar hjá føroyingum at sleppa av við upsa, at fleiri upsafiskiskapir, umframt aðrir fiskiskapir har vøran kappast beinleiðis við upsa, hava fingið ella fáa umhvørvismerki.

Kanningar, sum norska Eksportutvalget for Fisk gjørdi í 2004, vístu, at marknaðurin sannlíkt ikki fer at gjalda meira fyri fisk, sum hevur umhvørvismerkið. Hinvegin er tað ikki óhugsandi, at ein keypari heldur velur umhvørvismerkta vøru framum vøru, sum ikki hevur umhvørvismerkið.

### Hvat gera vit?

Í Føroyum er eingin støða tikin til, hvør leið skal takast í hesum málinum. Ávísar fyritøkur merkja eftirspurningin eftir umhvørvismerkingum í marknaðinum og tað eru eisini vikir, sum hava mist sáttmálar orsaka av manglandi umhvørvismerking.

Tað er eingin ivi um, at vit í Føroyum eisini mugu gera okkum greitt, hvønn veg vit vilja ganga í hesum málinum.

## Endurskoðan av lógini um vinnuliga fiskiskap

Fiskimálaráðið er í holt við at endurskoða lógina um vinnuligan fiskiskap. Føroya Ráfiskakeyparafelag hevur, eins og hini vinnufeløgini, umboð í fylgibólki til arbeiðsbólkin, sum arbeiðir við at endurskoða lógina. Arbeiðið er nú liðugt og ymisk lógaruppskot eru løgd fram, sum eitt úrslit av hesum arbeiði. Landsstýrismaðurin í Fiskivinnumálum hevur tó ikki lagt fram allar broytingarnar, sum arbeiðsbólkurin er komin við uppskotið um, orsaka av at tað ikki er semja millum samgonguflokkarnar. Broytingar, sum eru lagdar fyri Tingið, eru m.a. at tað ikki skal verða loyvt at eiga meira enn 20% av fiskidøgunum eftir ávísum fiskaslagið.

Tingið hevur ikki havt endaliga viðgerð av málinum enn. Ein onnur broyting, sum eisini er á veg í Tingið, er, at reglurnar fyri útlendskum eigaraskapi verða strammaðar upp og at keyp av fiskidøgum serliga til bólk 4T verða avmarkaðar soleiðis, at tað ikki skal bera til hjá trolbátum at keypa dagar frá partrolarum.

## Fiskur bjóðaður út í støddum

Tá sokallaði fiskapakking varð settur í gildi, fyri umleið tveimum árum síðani, varð ásett, at allur fiskur skuldi seljast um uppboðssølu har støddarbýtið á fiskinum var upplýst. Hetta var ikki komið uppá pláss á várið 2006 og Ráfiskakeyparafelagið setti seg í samband við Fiskimálaráðið og Faroe Fish Marked um, at nú var tað uppá tíðina at kunngerðin varð yvirhildin. Í september mánaða fráboðaði Faroe Fish Market, at allur fiskur nú verður bjóðaður út við upplýsingum um støddina á fiskinum.

Um sokallaði "fiskapakkin" hevur havt ávirkan á útflutingin av óvirkaðum fiski, er eitt sindur ringt at spáa um. Oljuprísirnir vóru sera høgir seinasta ár og hevur tað óiva havt ávirkan á atburðin hjá skipum, sum landa uttanlands. Hinvegin so er oljuprísurin lækkaður nakað aftur í 2006, men nøgdirnar av óvirkaðum fiski, sum fer av landinum, minkar framvegis . So eftir øllum at døma so hava lógarbroytingarnar havt sína ávirkan.

## Rist í svartkjaftatrol

Ráfiskakeyparafelagið hevur strongt á at fáa føroysku myndugleikarnar at seta krav um skiljirist í svartkjaftatrol. Hetta var gjørt orsaka av, at ábendingar vóru um, at ávísa árstíð er væl av hjáveiðu í pelagisku veiðuni – serliga upsi. Fiskirannsóknarstovan hevur síðani gjørt kanningar sum prógva hetta. 15. apríl 2007 var kunngerð lýst, sum skipar pelagiska fiskiskapin. Kunngerðin inniheldur ásetingar um, hvar tað ikki er loyvt at fiska svartkjaft, hvør hjáveiða er loyvd og krav um, at ein rist er í trolinum, sum skilir størri fisk frá.
Frá 1. juni 2007 skulu øll skip, sum trola eftir pelagiskum fiski brúka skiljirist ávísa árstíð.

## Verkføll raka útjaðaran

Ásannandi, at hvørja ferð verkfall er á allmenna arbeiðsmarknaðinum, so rakar hetta útjaðaran sera hart, hevur Ráfiskakeyparafelagið saman við Føroya Arbeiðsgevarafelag heitt á myndugleikarnar um, at okkurt má gerast fyri at sleppa undan hesum. Fundir hava verið við avvarandi landsstýrismenn og brøv eru skrivaði um hetta mál. Tað sýnist tó ikki, at nøkur skilagóð loysn er komin á hetta mál, sjálvt um myndugleikarnir fleiri ferðir hava lovað at nakað skal gerast. Felagið vil tí framhaldandi arbeiða við hesum málið.